# Brauer var aftur best

**HONDBÓLTUR** Barbara Brauer staðfesti aftur hesaferð, at hon er helst besti spælarin í kvinnudeildini í løtuni. Hon skeyt helvtina av málunum hjá Neistanum í gjár



*Jacklin Durhuus og Neistin vunnu uppiborið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

Barbara Brauer.

Eitt navn, sum aftur og aftur verður nevnt.

Tað er einki løgið í tí.

Hon hevur verið mest eyðsýndi leikarin í kvinnudeildini higartil. Við einari rúgvu av málum, eigur hon høvuðsleiklutin í, at Neistin er á øðrum plássi í løtuni.

Barbara Brauer gekk eisini fremst í dystinum um høvuðsstaðin í gjár. Hon skeyt 10 mál.

### Stóran leiklut

Tað er ikki at taka ov rívan til at staðfesta, at Barbara Brauer hevur tryggjað Neistanum fleiri stig í hesum kappingarárinum.

Var hon ikki í hópinum, hevði Neistin ikki verið nummar tvey í dag.

Hon var eisini mest týðandi spælarin hjá Neistanum í gjár. Aftur og aftur fór hon upp frá og sendi bóltin framvið málverjanum hjá Kyndli.

Grønu havnarkvinnurnar stríddust væl. Tað var einki væntað av teimum undan dystinum, og tær tóktust eisini fríar í sínum spæli.

Neistin fór ongantíð frá Kyndli. Munurin var sjáldan meira enn tvey mál. Kyndil tveitti í løtum ov nógvar bóltar burtur, og tað gagnnýtti Brauer fremst av øllum.

Neistin vann 20-18.

# VB rennur aftaná

**HONDBÓLTUR** Sambandið millum VB og ovastu liðini er framvegis ikki kvett. Vágskvinnur vunnu móti StÍF leygardagin

Uni Holm Johannesen

Úrslitið var 30-23.

Liðini fylgdust fyrstu løtuna, men miðskeiðis í fyrra hálvleiki setti VB ferðina upp og rann gestirnar um koll. Munurin var seks mál í steðginum, og StÍF hótti ongantíð leiðsluna.

Bára Mortensen var mest eyðsýndi spælarin hjá heimaliðnum. Aftur og aftur sendi hon framvið málverjanum. Hon var toppskjútti við níggju málum.

Sigurin hevur við sær, at VB er fimm stig aftan fyri Stjørnuna.

Vágskvinnur noyðast at vinna fleiri dystir upp í slag, um ovastu liðini ikki skulu fara undan teimum.

*uni@sosialurin.fo*

### **VB – StÍF** 30-23 (14-8)

Dómarar: Magnus í Króki og Thomas Juul Thomsen

**10 min.: 4-2**
**20 min.: 10-5**
**40 min.: 18-13**
**50 min.: 25-18**

**VB:** Bára Mortensen 9, Gurið Mortensen 6, Svava Vestergaard 4, Una Egilsdóttir 4, Justina Babarviciute 3, Gintare Lydekaite 2, Andrea Nielsen 1 og Rannvá Johannesen 1.
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8, Bára Berthelsen 6, Fríðrún Danielsen 3, Birna Johannessen 2, Birita Poulsen 2, Lilja Gregersen 1 og Mariann Petersen 1.
Útvísingar: VB 3 – StÍF 3

### **Neistin – Kyndil** 20-18 (12-8)

Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

**10 min.: 5-2**
**20 min.: 10-6**
**40 min.: 15-12**
**50 min.: 18-15**

**Neistin:** Barbara Brauer 10, Jacklin Durhuus 4, Katrin á Neystabø 2, Marjun Danberg 2, Bára Hansen 1 og Birita Wardum 1.
**Kyndil:** Randi Wardum 6, Jórun Ludvig 3, Anja Heinadóttir 3, Súsanna Petersen 2, Heidi Maria Akselsen 2, Asleyg Sunadóttir 1 og Turið Arge 1.
Útvísingar: Neistin 6 – Kyndil 3

### **Stjørnan – Tjaldur** 27-23 (14-11)

Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

**10 min.: 3-1**
**20 min.: 10-5**
**40 min.: 18-17**
**50 min.: 22-19**

**Stjørnan:** Durita Ljósstein 8, Valentina Suciu 7, Durita Christophersen 6, Una Olsen 3, Anna Kristina Samson 2, Judit Hansen 2 og Durita Mikkelsen 1.
**Tjaldur:** Cornelia Holca 7, Adina Petrea 7, Sarah Ann Thomsen 4, Simona Petersen 2, Annika Thomsen 2, Jóhanna í Króki 1.
Útvísingar: Stjørnan 5 – Tjaldur 7

# Stjørnan eigur oddasessin

**HONDBÓLTUR** Stjørnan staðfesti oddasessin, tá kvinnurnar úr Klaksvík vunnu oddabrakið móti Tjaldrinum



*Stjørnan staðfesti oddasessin móti Tjaldrinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

Stjørnan hevur verið besta liðið fyrsta fjórðingin av hesum kappingarárinum.

Tað varð staðfest í gjár, tá føroyameistararnir vunnu móti Tjaldrinum á heimavølli.

Við tólv stigum av tólv møguligum eru greiðar ábendingar um, at Stjørnan fer at stríðast um gullmerkini aftur í ár.

### Vunnu uppiborið

Stjørnan rann við fullari ferð frá fyrsta bríksli. Vanligu stórskjúttarnir hjá Tjaldrinum høvdu trupult við at sleppa til skot, tí verjan hjá heimaliðnum var stinn.

Álopsspælið hjá Stjørnuni riggaði væl. Heimaliðið flutti bóltin skjótt og spældu seg oftast til ein upplagdan møguleika.

Tjaldrið legði nógv fyri í seinna hálvleiki. Einu løtuna var javnleikur. So fór Stjørnan aftur upp í ferð og vann sær leiðsluna aftur.

Fýra minuttir restaðu í, tá klaksvíkskvinnurnar vóru á odda við seks málum. Gestirnir úr Runavík pyntaðu um úrslitið seinastu løtuna.

Endaliga úrslitið var 27-23.

### Heimadystirnir

Stjørnan hevur verið besta liðið higartil.

Hinvegin hava tær spælt á heimavølli Tjaldrinum og Neistanum, sum verða mettir sum avbjóðararnir í gullstríðnum.

Næstu vikurnar skulu klaksvíkskvinnurnar veruliga vísa sína styrki, tá tær skulu royna seg á útivølli móti hesum liðunum.

## **Atlantic Airways** *kappingin*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 6 | 198 | 153 | 45 | 11 |
| 2 | KÍF | 6 | 173 | 150 | 23 | 9 |
| 3 | Kyndil | 6 | 157 | 154 | 3 | 7 |
| 4 | H71 | 5 | 131 | 126 | 5 | 6 |
| 5 | StÍF | 6 | 143 | 137 | 6 | 4 |
| 6 | VÍF | 5 | 129 | 133 | -4 | 3 |
| 7 | Team Klaksvík | 6 | 132 | 210 | -78 | 0 |

## **Sunset** *kappingin*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 6 | 178 | 135 | 43 | 12 |
| 2 | Neistin | 6 | 167 | 142 | 25 | 9 |
| 3 | VB | 6 | 154 | 158 | -4 | 7 |
| 4 | Tjaldur | 5 | 145 | 119 | 26 | 6 |
| 5 | Kyndil | 5 | 111 | 129 | -18 | 2 |
| 6 | VÍF | 6 | 149 | 185 | -36 | 2 |
| 7 | StÍF | 4 | 92 | 128 | -36 | 0 |